Næmingar á seturskúla í Noregi

Í samband við samstarvið, sum er millum vinarbýirnar hjá Klaksvíkini, verður m.a. eisini skipað fyri seturskúla fyri skúlabørnunum. Endamálið við hesum seturskúlum er at geva børnunum høvi til betri at kunna seg um mentan og viðurskifti hjá vinarbýum okkara, samstundis sum tey helst skuldi fingið vinir fyri lívið.

Skúlarnir í Klaksvík senda hvørt ár ein flokk at luttaka í hesum samstarvi. Vanliga er tað ein 8. flokkur, ið fer avstað. Skúlarnir á Ziskatrøð og við Ósánna skiftast um at senda ein flokk annaðhvørt ár. Í ár er tað ein flokkur frá skúlanum við Ósánna, ið fer til Noregs á seturskúla.

Vinarbýirnir hjá Klaksvíkini eru Norrköping í Svøríki, Odense og Grenå í Danmark, Sisimiut í Grønlandi, Tammerfors í Finnlandi, Kópavogur í Íslandi, Wick í Skotlandi og Trondheim í Noregi.

Við tað at tað í ár eru 1000 ár síðan Trondheim var grundlagur, er seturskúlin lagdur at vera har í september mánaði í ár.

Sum vera man stuðlar kommunan ferðini væl fíggjarliga, men næmingarnir mugu sjálvir savna nakað av peningi. Í hesum sambandi fara tey at hava ymisk tiltøk. Fyrsta tiltakið verður leygardagin 1. februar. Tá fara tey at hava mat tombola og fiskidamm í høllini á Ósaskúlanum. Tey vóna at nógv fólk fara at støkka inn á gólvið og stuðla teimum. Høvi verður eisini at keypa sær ein kaffimunn og okkurt afturvið. Tiltakið byrjar kl. 10 og endar um 2-tíðina.

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag

Skrásetingar-nr.:
Sp/f 2602

Navn:
Sp/f Ljómbúðin

Adressa:
100 Tórshavn

Kommuna:
Tórshavnar Kommuna

Stovningardato:
23.12.1996

Viðtøkudato:
23.12 1996

Kapitalur:
Kr 80 000,00

Inngjaldingarháttur:
Kr. 80 000,00 í øðrum virðum til kurs 100

Stovnarar:
Jón Othamar, 420 Hósvík

Stjórn:
Jón Othamar, 420 Hósvík

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av einum stjóra

Grannskoðari:
Sp/f Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta, 100 Tórshavn

Roknskaparár:
01.01.-31.12

Fyrsta roknskaparár:
23.12.1996-31.12.1997

Endamál:
Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi

Skráseting Føroya
tann 22. januar 1997

Kristin Balle

TVINGSILSSØLA

Hósdagin
tann 20. februar 1997
kl. 11.00

verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 48 b, Garðsendi 5, 700 Klaksvík (AS nr. 222/96).**

Ognin er eini sethús 89 kvm í kjallara og einari hædd og krúpiloftí. Gjørd av timbri, takt við eternit. Kjallari 1 stórt rúm og 1 kamar. Ikki gongt millum kjallara og stovuhædd. Stovuhædd: gongd, baðirúm, køkur, stova, hjúnarúm og 2 smá kømur. Umboð fyri eigaran upplýsir, at vindeygu í stovu og norðureftir leka illa. Ongar hvítvørur eru í húsinum. Onkur veggur stendur hálvgjørdur, og annars eru húsini ikki í serliga góðum standi, og einki er gjørt rundanum. Tey eru bygd í 1977. Stykkið er til støddar 546 kvm.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Christian Andreasen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 960038)**, sum kann geva nærri upplýsingar, eins og avtala kann gerast við um at siggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast frá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann 27. jan. 1997

Fimm umboð hjá Norsk Hydro vóru herfyri á jarðfrøðiligari ráðstevnu í Havn. James Efstathiou var við. Hann er í miðjuni. Uttast til vinstru er Bjørn Larsen, ein av fremstu serfrøðingunum hjá Norsk Hyrdo, tá talan er um Atlantsmótið. Mynd jan

James Efstathiou frá Norsk Hydro:

Bora seint í 99 - oljuframleiðsla í fyrsta lagi 2005

-Verða loyvi at bora eftir olju givin á heysti 1998, verða vit klárir at bora móti ársenda í 1999. Er tú heilt bjartskygdur og vit finna olju longu í ár 2000, so kann roknast við, at oljuframleiðsla kann byrja við Føroyar um ár 2005 sigur James Efatatihiou, sum er projektleiðari hjá Norsk Hydro á Atlantsmótinum.

Jan Muller

James Efstathiou, sum stendur á odda fyri kanningunum hjá Norsk Hydro í føroyskum øki heldur fyri, at teir meta møguleikarnar fyri at finna olju og gass við Føroyar at vera stórar.

Men nær heldur hann, at veruligt gongd kemur á leitingina?

-Hava til eina lisensrundu í fyrsta ársfjórðingi av 1998, og loyvi verða givin í 3. ársfjórðingi hetta árið, so fer at ganga eitt ár, til klárt verður at bora tvs. móti endanum á 1999.

Um tað fer at ganga væl og ein er so bjartskygdur sum til ber, so kann ein rokna við, at tað fara at ganga eini 4-5 ár, áðrenn framleiðsla fer í gongd.

Hetta merkir, at finnur tú longu olju í ár 2000, so verður talan um fyrstu framleiðsluna í umleið ár 2005.

James Efstathiou sigur annars, at tað er rættiliga torført nú at siga nakað við vissu, tí hetta hevur eisini nógv at gera við møguleikan at fáa ein boripall, og ta er ikki minst avgerandi á hvørjum dýpi tú ætlar tær at bora. Um tú skal út á djúpt vatn t.d. 600 metrar, so krevst serstakur boripallur til ta uppgávuna, tí tá koma streymviðurskiftini meira inn í myndina. Eftirspurningurin er boripallum, sum kunnu bora á djúpum vatni, er eisini stórur. So her skulu nógvir spurningar greiðast, áðrenn ein kann gera av at leiga ein boripall.

Vónar marknaósemja verður loyst

Tað er eingin loyna, at oljufeløg sum Norsk Hydro fegin síggja, at marknatrætan millum Føroyar og Bretland verður loyst skjótast gjørligt.

-Eg fari sjálvandi ikki at leggja meg út í eitt slíkt mál, tí tað er ein sak millum Føroyar og Bretland, men tá spurt verður um hetta, so kann eg bert siga, at tað hevði verið lættari og meira hugaligt at arbeitt, um eingi umstridd øki vóru.

Hann vísir á, at teir í løtuni sjálvandi leggja seg eftir at kanna økini, sum vóru við í nominatiónini herfyri, men hendir tað, at ein semja fæst um markið, so kunnu teir sum oljufelag rættiliga skjótt gera tær neyðugu kanningarnar í hesum økjunum.

James Efstathiou dylur ikki fyri, at hóast tað eru fleiri áhugaverd øki í føroyskum umráði, so er tað helst so, at tey allarbestu og mest lovandi økini finnast í teimum umstriddu umráðunum. Ein orsøkin til hetta er so eisini tann sannroynd, at partur av umstriddu økjunum er ikki dekkaður við tjúkkum basaltløgum. Eisini finnast nógvar og nágreiniligar seismiskar kanningar frá teimum umstriddu økjunum.

Landsstýrið hevur boðið norska konganum á vitjan í ár. Heldur projektstjórin hjá Norsk Hydro fyri Atlantsmótið, at vit tá fara at síggja ein langan hala av norskum vinnulívsfólki, harímillum oljufólki, aftaná konganum?

-Tit skulu helst ikki vera bilsin, um ikki framstandandi vinnulívsfólk vera við, eitt nú oddafólk hjá Norsk Hyrdo sigur James Efstathiou, sum tó leggur dent á, at hann veit einki meira um hesa vitjan enn tað sum er komið fram alment.

Spennandi seismikkúrslit

James Efstathiou sigur, at teir í løtuni eru við at viðgera seismiska tilfarið í smálutum, og at teir eisini eru í ferð við at útvega sær enn meira tilfar, soleiðis at teir verða betri førir fyri at siggja undir basaltið.

Teir bíða m.a. í spenningi eftir endaligu úrslitinum av serstøku seismisku kanningunum við teimum báðum skipunum í fjør summar, Thetis og Western Cowe.

Sosialurin skilur, at úrslitið av hesum kanningum er rættiliga einastandandi. Herfyri vórðu nøkur av úrslitinum frá kanningini kunngjørd á einum fundi hjá Amerada Hess í Keypmanhavn. Tey søgdu m.a. hvussu tjúkt basaltið er og somuleiðis sedimentløgini undir basaltinum.

Norsk Hydro er partur av Amerada Hess bólkinum, har hini feløgini eru Amerada Hess, Dong og Lasmo.

Fyritøkan sær stórar møguleikar alla staðni á Atlantsmótinum. -Vit halda, at alt økið frá Barentshavinum fyri Norðan og heilt suður til Írlands verða eitt komandi oljuøki, og tí eru vit eisini sinnaðir at gera íløgur her, og her eru Føroyar ein týðandi partur sigur James Efstathiou.

Annars arbeiðir Norsk Hydro kring alla verðina og er eitt sokallað mutinationalt felag. Fyritøkan, sum er tann næstastørsta í Noregi, hert Statoil er størri, hevur skrivstovur í 80 londum og hevur umleið 30.000 fólk í arbeiði. Helvtin er í Noregi. Umframt olju tekst fyritøkan við mangt annað so sum aling og foðurframleiðslu. Sum ídnaðarfyritøka er Norsk Hydro størst í Noregi. Norski staturin eigur 51% í fyritøkuni, meðan privatir partaeigarar eiga restina.